# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**





Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Oyggjablaðið í næstu viku: GRØNLAND

## Hesaferð: Funningsfjørður

**Oyggjablaðið hesaferð snýr seg um grannabygdirnar báðar, Funningsfjørð og Elduvík. Lesið í hesum blaðnum:**

**Síða 16:** Fólkatal

**Síða 18-19:** Gestur: Skúlin er fínur, men ...

**Síða 20-21:** Malvinus (79) dámar væl seyð

**Síða 22-23:** Framleiða 300 plattar um tímar

**Síða 24-26:** Rebekka (13) skrivar og teknar

# Akkurát ikki 100



**FÓLKATAL** Hóast Funningsfjørður liggur fáar kilometrar frá høvuðsvegi, hevur bygdin heldur ikki kunnað forða eini afturgongd í fólkatalinum seinastu árini.

Snorri Brend

Hagstovan hevur savnað saman eitt yvirlit yvir gongdina í fólkatalinum í Funningsfirði seinastu 26 árini.

Í 1985 búð 95 fólk í bygdini, og fýra ár seinni var talið komið heilt upp í 99 – tað vil aftur siga, at tað vantaði bara eitt fólk í at røkka teimum hundrað íbúgvunum.

Síðani tá hevur fólkatalið minkað ár undan ári, til tað í dag er komið niður á 60.

Ikki tí, tað hevur verið munandi lægri. Tað var í 1995, tá fólkatalið var komið heilt niður á 48 fólk.

Seinastu árini er fólkatalið tó økt aftur. Í 2009 búðu 53 fólk her, og í fjør altso 60.

Í grannabygdini, Elduvík, hevur hinvegin verið afturgongd í fólkatalinum seinastu 25 árini.

Í 1985 vóru 44 fólk í bygdini, í 1995 30 og í 2005 26 fólk. Í dag er talið av íbúgvum millum tað lægsta nakrantíð, nevniliga 24.

## 200 ár

Næsta ár eru 200 ár liðin, síðani fólk settu seg niður í Funningsfirði í 1812.

Í løtuni eru trý arbeiðspláss í bygdini – bygdarskúlin, alistøð og Atlantshav, ið framleiðis plattar til føroyska og útlendska marknaðin.

Hinvegin var ein hvalastøð í bygdini fyri 100 árum síðani. Henda var virkin í árunum 1902 til 1913.

Fyrstu húsini, ið vórðu bygd í Funningsfirði eru varðveitt og standa niðri við fjøruna.

## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.

Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.

Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.

Vit hava valt at kalla rundferðina "Føroyar - norðast til sunnast". Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt - at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.

Góðan lesihug.

*snorri@sosialurin.fo*